Hartar USA

Leiðarin í altjóða kjarnorkustovninum, Mohamed ElBaradei, heldur, at altjóða samfelagið eigur at uppfata kríggið í Írak sum eina ávaring um, at tað er neyðugt við betri samanhaldi í heimssamfelagnum.

– Hetta eigur at siga okkum, at tað loysir seg best at loysa trupulleikar við orðaskifti og samráðingum. Eg haldi ikki, at kríggj er tann besta loysnin, hvørja ferð vit eru ósamd um, hvussu trupulleikar skulu loysast, sigur Mohamed ElBaradei.

Saman við svianum Hans Blix hevði hann ábyrgdina av ST-vápnaeftirlitsmonnunum í Irak. Teir báðir hava síðani kríggið mælt USA til at lata eftirlitsmenninar sleppa aftur til Irak at leita eftir møguligum hópoyðingarvápnum, men tað vilja amerikanararnir ikki. ElBaradei sigur amerikansku avgerðina vera ørkymlandi, og hann leggur amerikansku stjórnina undir líkasælu.

Fekk viðgerð í London

Ein fýra ára gomul iraksk genta fekk sunnudagin hjartaskurðviðgerð í London, eftir at sjúkrahúsið í Bagdad, sum skuldi viðgera hana, varð herjað av ránsmonnum. Irakska gentan varð fødd við einum hjartabreki, og hon lá á einum sjúkrahúsi í Bagdad, tá amerikansku hermenninir tóku býin.

Tað tók læknunum á Royal Brompton-sjúkrahúsinum í London tríggjar tímar at viðgera gentuna, og læknarnir siga, at hon hevur tað gott eftir umstøðunum.

Hjálparfelagsskapurin Chain of Hope sigur, at fleiri hundrað iraksk børn eru í somu støðu sum tann fýra ára gamla gentan, og at teimum tørvar viðgerð sum skjótast. Men tey nógvu herverkini og ránini á sjúkrahúsunum í Bagdad hava gjørt, at trot er á ymsari útgerð, og tí kunnu børnini ikki fáa ta neyðugu viðgerðina har, sigur felagsskapurin. Tann fýra ára gamla gentan er heldur ikki tað fyrsta irakska barnið, sum hevur fingið viðgerð í Bretlandi. Í síðsta mánað varð eitt seks mánaðar gamalt barn viðgjørt á einum sjúkrahúsi í Liverpool.

Kommunur leggja saman

Tað er ikki bara í Føroyum, at tosað verður um kommunusamanlegging. Soleiðis er eisini í Danmark.

Sambært Jyllandspostinum arbeiðs í hvussu er 40 danskar kommunur í hesum døgum við ætlanum um at leggja saman, og áðrar ganga í tonkum um at gera tað sama. Høvuðsorsøkin til gongdina er, at stjórnin væntandi skjótt fer at koma við boðum um, at kommunurnar skulu leggjast saman í størri eindir, og tí velja nógvar kommunur at taka stigið, áðrenn stjórnin ger tað fyri tær. Talsfólk hjá stjórnarflokkunum hava eisini sagt, at vilja kommunurnar ikki leggja saman við góðum, verða tær tvingaðar til at gera tað.

Í fjør gjørdu tær fimm kommunurnar á Bornholm av at skipa oynna sum eina kommunu, og í næsta mánað skulu íbúgvararnir í teimum báðum kommununum á Ærø taka støðu til ta sama. Á Langeland hava kommunurnar stutt síðani gjørt av at leggja saman.

Keypa færri bilar

Tann skeiva búskapargongdin í Evropa ávirkar nú eisini hugin hjá fólki at keypa sær nýggjan bil, men myndin er ikki tann sama allastaðni.

Eitt nú vísir tað seg, at eysturríkarar, finnlendingar, italiumenn og sviar hava keypt fleiri nýggjar bilar higartil í ár enn somu mánaðir í fjør. Serliga í Finnlandi er bilasølan vaksin nógv, heili 21 prosent.

Í hinum ES-londunum keypa fólk ikki so nógvar nýggjar bilar longur, og í Danmark er bilasølan minkað sera nógv. Í apríl keyptu danir 23 prosent færri bilar enn í apríl í fjør, og hetta var tann ringasti aprílmánaði hjá donsku bilasølunum í heili 35 ár. Men eitt bilmerki heldur tørn í Danmark og væl tað. Tað er japanska Mazda, sum í apríl seldi næstan 60 prosent fleiri bilar enn í apríl í fjør, og seinastu fýra mánaðarnar eru 40 prosent fleiri Mazda-bilar seldir í Danmark enn somu mánaðir í 2002.

UTTAN ÚR HEIMI

Norðmenn vilja upp í ES

Var fólkaatkvøða í Noregi nú um limaskap í ES, høvdu 64 prosent atkvøtt fyri

NOREG OG ES
Árni Joensen:

Seinastu mánaðarnar hava meiningakanningar í Noregi givið teimum, sum eru ímóti ES-limaskapi, veksandi undirtøku, men sambært einari nýggjari kanning er gongdin vend nú.

Kanningin, sum blaðið Aftenposten og norska útvarpið hava gjørt, og sum varð almannakunngjørd í gjár, vísir, at høvdu norðmenn sloppið at tikið støðu til spurningin nú, høvdu 64 prosent atkvøtt fyri limaskapi í ES. Bert 19 prosent siga, at tey høvdu atkvøtt ímóti, og tey seinastu 17 prosentini hava ikki tikið støðu.

Kanningin avdúkar eisini, at 22,7 prosent av teimum, sum søgdu nei á fólkaatkvøðuni um ERS-limaskap í 1994, høvdu atkvøtt ja nú.

Aftenposten skrivar, at meðan meiri enn helmingurin av teimum spurdu kvinnunum vóru ímóti limaskapi fyri einum góðum mánað síðani, taka 60 prosent av kvinnunum nú undir við ES-limaskapi. Hendan sama gongdin er eisini galdanfi fyri tey, sum hava lá- og meðalinntøkur, skrivar blaðið.

Belgiska stjórnin heldur fram

Guy Verhofstadt kann halda fram sum belgiskur forsætisráðharri.

Men valið sunnudagin gav eisini einum víðgongdum høgraflokki stóra framgongd

BELGIA
Árni Joensen:

Av teimum belgisku stjórnarflokkunum vóru tað serliga sosialistarnir, sum fingu eitt gott úrslit sunnudagin, men kortini ikki nóg mikið til at broyta lutfallið millum sosialistarnar og teir liberalu flokkarnar í samgonguni. Eisini flokkurin hjá Guy Verhofstadt, forsætisráðharra hevði framgongd.

Harafturímóti høvdu umhvørvisflokkarnir eitt vánaligt val, og tað ger, at flokkarnir halda ikki fram í samgongustjórnini.

Teir liberalu flokkarnir fingu 49 umboð í tjóðartingið og sosialistarnir 48, so flokkarnir hava greiðan meiriluta í tinginum, sum hevur 150 limir.

Men valið gjørdist eisini ein stórsigur hjá tí tjóðskaparsinnaða høgraflokkinum Vlaams Blok. Flokkurin fekk næstan 19 prosent av atkvøðunum, og tá er vert at hava í huga, at hann fekk allar atkvøðurnar í tí flamska partinum av Belgia. Hetta er tað besta valið hjá flokkinum, síðani hann var stovnaður fyri 25 árum síðani.

Arafat skal byrgjast av

Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, vil ikki koyra Yasser Arafat í útlegd, men hann skal byrgjast av í Ramallah

MIÐEYSTUR
Árni Joensen:

- Vit eiga at koyra Arafat í útlegd, tí so høvdu vit sloppið undan at síggja hann ganga eftir reyðum leyparum, tá hann kurteisliga tekur í hondina á leiðarum víða um heimin, skal ísraelski verjumálaráðharrin, Shaul Mofaz, have sagt á einum stjórnarfundi sunnukvøldið.

Men Ariel Sharon, forsætisráðharri vildi ikki koyra Arafat í útlegd. Ístaðin varð avgjørt at byrgja palestinska forsetan av í Ramallah. Hetta ber millum annað í sær, at útlendskir politikarar og diplomatar, sum fara til Ramallah at tosa við Arafat, sleppa ikki at tosa við ísraelsku stjórnarlimirnar.

Ariel Sharon sigur, at Arafat hevur ábyrgdina av teimum nógvu palestinsku sjálvmorðsbumbuatsóknun um seinastu dagarnar. Hesum vísa palestinar aftur. Teir vilja harafturímóti vera við, at ísraelska mótstøðan ímóti teirri seinastu amerikansku friðarætlanini ger, at ófriðurin heldur fram.

Palestinar hava góðkent amerikanska uppskotið, men tað hevur Ísrael ikki gjørt.

Brandur skal syngja í Jelling

Føroyska poppidolið skal á stóra pallin, og hann hevur fingið góða tíð millum fleiri av høvuðsnøvnunum á festivalinum. Tað er óvanligt, at ein sangari verður tikin inn á høvuðspallin so stutt áðrenn festivalin

Tað var ein pallborðsfundur í Fuglafirði, sum fingu umboðini fyri festivalin í Jelling at spíla eygu og oyru upp. Brandur Enni sang nakrar sangir, og tað gjørdi hann so sannførandi, at samband beinanvegin var millum Jelling og Brand.

Hóast tað er óvanliga seint at seta nýtt navn á skránna fyri høvuðspallin, so er tað nú greitt, at Brandur skal spæla í Jelling síðst í mai mánaði. Hann hevur fingið gott pláss á stóra pallinum, har hann skal syngja millum nøvn sum Nik & Jay og Kim Larsen tann 29. mai kl. 14.15.

Á heimasíðuni hjá Jelling Festivalinum – www.jellingmusikfestival.dk - greiða teir frá um Brand Enni.

Eisini Déjá Vu fer at spæla í Jelling. Teir spæla á einum av minni pallinum tann 30. mai kl. 19.00.

4. flokkur roynir seg í sangi

4. flokkur í Vágs skúla vitjaði í vikuni í útvarpsstovuni á Suðurrás, har tey sungu heimagjørdan sang

TÓNLEIKUR
Dagfinn Olsen

4. flokkur í skúlanum í Vági hevur við sanglæraranum skrivað sangin "Lítla Ása". Í vikuni sluppu tey at royna seg sum sangarar. Tey vitjaðu í útvarpsstovuni á Suðurrás og har tóku tey sangin upp.

4. flokkur og sangur teirra verður at hoyra í sendingini Viðurgerði, sum verður send hósdag klokkan 17 og endursend fríggjadagar klokkan 14. Nú summarskrá útvarpsins byrjar, er hetta seinasta sending av hesum slag á hesum sinni.

4. flokkur í Vágs skúla vitjar í útvarpsstovuni á Suðurrás

Putnam pútan!

Nú fæst hon eisini í Føroyum.
Kom og royn hana, vit bjóða allan peningin aftur innan 30 dagar, um tær ikki dámar pútuna.

Opið er sarandisdagar kl. 12 - 17
Ergo & Hjálpartól
J.C. Svabosgøta 8 • FR-100 Tórshavn
Tel. 315 777 • Fax 315 772 • Fartel. 215 778
Teldupost: ergo@post.olivant.fo • Heimasíða: www.ergo.fo

NM í bridge

Norðurlendsk meistarakapping á Hotel Hafnia

Skrá
Mánadag (2 dystir) kl. 14:30 - 20:00
Týsdag (3 dystir) kl. 10:00 - 14:40 - 20:00
Hósdag (3 dystir) kl. 10:00 - 14:40 - 20:00
Fríggjadag (2 dystir) kl. 10:00 - 14:30

Áskoðarar er vælkomnir at fylgja bestu bridgespælarum í Norðurlondum.

Postverk Foroya · LV · Balslev · Foroya Sparikassi · formula.fo · MBM

KEMILUX

Søluleiðari

Starvið sum søluleiðari í fyritøku okkara verður hervið lýst leyst til setan skjótast gjørligt.

Starvið fevnir um
- Søluleiðarin hevur ábyrgdina av at leggja søluarbeiðið til rættis. Hetta bæði innanlands og uttanlands.
- Dagliga marknaðarrøkt
- Skeiðvirksemi fyri kundum
- Fyrireikingar til sølumessur
- Føra virksið inn á nýggjar sølumarknaðir
- Gera fíggjaretlan fyri nevndu økir

Førleikakrøv
- Stórur dentur verður lagdur á, at tú hevur søluroyndir og leiðsluroyndir.
- At tú ert málkønur, serliga á enskum.
- Tú skal hava teldukunnleika á brúkarastøði.
- Góð samstarvsevnir.

Lønarviðurskifti
Lønt verður eftir nærri avtalu.

Umsóknin
Tú ert vælkomin at ringja til Debes Petersen, telefon 31 08 33 ella 21 77 08, um tú ynskir fleiri upplýsingar.

Umsóknin skal sendast til P/F KEMILUX industri, Mykinesgøta 1, Box 1231, 110 Tórshavn, og vera okkum í hendi í seinasta lagi 28. mai 2003

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði

Kemilux bleiv stovnað í 1965. Virkið framleiðir sápu, og selja vit harafturat reingerðarambað av øllum slag.
Stórur partur av framleiðsluni verður flutt til Danmarkar, Íslands, Noregs, Skotlands og Kanada. Størsti parturin av søluni fer til fiskiídnaðin og til skip. Nógv fer harafturat til onnur virkir á landi, stovnar og til privat húsarhald. Parturin til oljuídnaðin rokna vit við fer at mannast í næstum.

Sosialurin 341830